GJALDSTOVAN

# Mál og avrik

# 2014

# INNIHALDSYVIRLIT

**INNGANGUR** 2

**STRATEGISK FOKUSØKI (TÆNASTUR) FØROYA GJALDSTOVA** 2

**Landsins roknskaparverk** 2

**Bókhald og løn** 2

**Roknskapur** 2

**Umsita gjaldføri og skuld** 2

**Leiðslukunning** 3

**Skeið o.tíl.** 3

**Búskaparskipan landsins** 3

**Landsnet** 3

**KT-trygd** 3

**Fyrisiting Kvíggjartún 1 (FMR)** 3

**VISIÓN OG MISSIÓN:** 4

**ALMENT UM MÁL OG AVRIK 2014:** 4

**YVIRLIT YVIR TÆNASTUR, MÁL OG FOKUSØKI 2014** 5

**SÁTTMÁLASKEIÐIÐ OG UPPFYLGING** 8

**FYLGISKJAL UPPFYLGING 2013** 9

## Inngangur

Hesin avrikssáttmáli er millum Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna. Í sáttmálanum er dentur lagdur á uttanhýsis vend mál. Málini eru so vítt gjørligt sett í mun til niðanfyristandandi ábyrgdarøki.

## Strategisk fokusøki (tænastur) Føroya Gjaldstova

**Ábyrgdarøkið** kann natúrliga verða býtt sundur í hesar høvuðsuppgávur:

### Landsins roknskaparverk

Gjaldstovan hevur um hendi yvirskipaðu bókhalds- og roknskapar uppgávurnar fyri konsernina landið. Hetta er:

- Halda viðlíka sentralar parametrar og stamdátur
- Innlesa data frá skipanum og senda til skipanir, t.d. frá TAKS, Almannaverkinum,
- Endurrinda MVG hjá stovnunum, avrokna millum land og kommunur
- Umsita rokningarverkgongd
- Umsita sentralar koyringar í skipanum t.d. lønarskipanini
- Stemma av og gera yvirskipað eftirlit
- Ráðgeva

### Bókhald og løn

Gjaldstovan førir eisini vanligt bókhald og lønarbókhald fyri lítlar stovnar og førir bókhaldið fyri millumrokningina millum land og kommunur. Gjaldstovan avgreiðir allar útgjaldingar úr landskassanum og stemmar av gjaldingar. Gjaldstovan veitir gjaldføri til stovnarnar.

### Roknskapur

Gjaldstovan ger mánaðarroknskapir og ársroknskapin. Karmur um hetta arbeiði er roknskapargóðkenningarskipanin. Gjaldstovan ger neyðug yvirlit til játtanareftirlit, roknskap, hagtøl o.tíl.
Almenni roknskapurin verður eisini gjørdur í skipanunum hjá Gjaldstovuni við støði í mánaðarligum innrapporteringum.

### Umsita gjaldføri og skuld

Gjaldstovan umsitur gjaldførið hjá landinum. Uppgávan er, at landið altíð hevur gjaldføri tøkt og at tað fæst sum mest burturúr, við givnum váða. Landið skal sambært løggávu at 2,025 mia í tiltaksgjaldføri í 2014. Endamálið er at tryggja landsins rakstur í minsta lagi ½ ár fram, skuldi tað hent seg, at inntøkur landskassans svíkja.

Gjaldstovan umsitur eisini skuldina hjá landinum, sum er at fyrireika lántøku og umsita afturgjaldingar. Lántøkan verður tikin til marknaðarkor. Føroyar vera í hesum sambandi rataðar, tað vil siga, at evnini hjá Føroyum at rinda lán aftur verður mett leypandi. Gjaldstovan tekur sær av teimum uppgávum, sum rating-stovnurin áleggur okkum.

### Leiðslukunning

Allar viðkomandi dátur verða vístar í leiðslukunningarskipanum. Politikkurin er, at ongar týdningarmiklar dátur eru longri burtur enn 5 sekund.

### Skeið o.tíl.

Undirvíst verður í øllum virkisøkinum hjá Gjaldstovuni, t.d. formligum reglum, mannagongdum, KT-trygd, skipanum, leiðslukunning og í ymsum skipanum innan Landsnet. Eftir nágreiniligari avtalu ráðgevur Gjaldstovan eisini í at gera avtalur, í kt-trygd og í at skipa roknskaparverkið.

### Búskaparskipan landsins

Gjaldstovan hevur um hendi at menna, halda viðlíka og reka Búskaparskipan landsins. Stovnarnir hava atgongd til skipanina at fremja sínar uppgávur innan búskaparumsiting. Búskaparskipan landsins er skipað sum integrerað tænasta á Landsneti.

### Landsnet

Deildin KT-Landsins hevur uppgávuna at veita almennum stovnum KT-tænastur og samskipa KT hjá landinum á yvirskipaðum stigi, so tað almenna fær munadyggar KT-loysnir. Tænasturnar fevna um at hýsa og reka servarar og netverk, seta upp og veita atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum, KT-stuðul og hjálp til brúkarar. Samskipanin fevnir um at ráðgeva í KT-spurningum/verkætlanum, standardisera politikkir og mannagongdir og at standa fyri at gera yvirskipaðar strategiir fyri KT-økið hjá landinum.

### KT-trygd

Gjaldstovan hevur skipað KT-trygd sum eitt virkisøki burturav, fyrst og fremst fyri at tryggja skipanirnar undir Fíggjarmálaráðnum. Umframt at tryggja dátur í Búskaparskipan landsins og Landsneti, so kunnu stovnarnir brúka tilfar og arbeiðshættir, sum eru ment á hesum øki.

### Fyrisiting Kvíggjartún 1 (FMR)

Gjaldstovan hevur um hendi at umsita bygningin Fíggjarmálaráðið (Albert Hall). Í tí er eisini at vaska, húsavarðauppgáva, kantina og móttøka.

## Visión og missión:

**Visión (leiði stjørna):**

**Vit rudda slóð fyri, at almennu Føroyar eru millum effektivastu og kompetentastu fyrisitingar í heiminum.**

**Missión:**
**Gjaldstovan stuðlar undir og mennir effektivar og góðar loysnir innan KT og búskaparfyrisiting at leiða almennu Føroyar.**

## Alment um mál og avrik 2014:

Stórur partur av arbeiðinum hjá Gjaldstovuni tvey tey næstu árini er undir yvirskriftini ”Vit fáa tað í langtíðarjavnvág, sum vit eru farin í holtur við”. Her kann verða nevnt:

- Umfatandi dagføring av BSL
- Enda at seta BSL í verk á stovnunum
- Enda at seta Landsnet í verk á stovnunum
- Fáa grannskoðanir og eftirlit í fasta legu
- Fáa greiðar avtalur við stovnarnar um fakservarar á Landsneti
- Fáa skil á projektum við at seta á stovn projektorganisatión
- Fáa skil á skjølum o.t. í Sharepoint
- Fáa samskipað organisatiónina, m.a. samskifti
- Málrætta skeiðsvirksemið enn meira

# Yvirlit yvir tænastur, mál og fokusøki 2014

| | **Hvat?** (Sagnorð) | **Svar** (Navnorð) | **Tænasta** ***sí heimasíðu*** | **Mál** | ***Fokusøki heilt yvirskipað*** | **Tvørgangandi mál og fokusøki** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Reka | Roknskaparverk landsins | **Landsins roknskapar-verk** | | | **Mál: 4% av arbeiðstíðini til førleikamenning** | ***Felags fokusøki á Gjaldstovuni:***<br>***Gjaldstovan 75 ár***<br>***Stýr á skjølum***<br>***Felags samleika***<br>***Felags samskifti***<br>***Projekt*** |
| 2 | Veita | Landsbókhald o.t. | **Bókhald løn og gjaldingar** | | *Prekontera*<br>*Optimera RVG*<br>*Fleiri stovnar við í oio*<br>*Leggja út funktionalitet at prekontera rokningar*<br>*Seta innkeypara á rokningar*<br>*Automatisera Billing (Samnet, Access Points og Srv. beinl. í billing)* | | |
| 3 | Gera | Roknskap o.t. | **Roknskapur** | | | | |
| **4** | **Veita** | **Gjaldføris- og skuldarrøkt** | **Gjaldføri og skuld** | Mál: Avkastið av gjaldførinum skal í minsta lagi samsvara við tey av Fígging Landsins frammanundan útvaldu benchmark | *Vit skulu velja okkum eitt index at samanbera við og vit skulu fáa rapportera rentuna í gjaldførisyvirlitið.*<br>*Stýra betur innistandandi undir hesum at stýra betur dagliga gjaldførinum* | | |
| 5 | Veita | Avgerðar-grundarlag | **Leiðslu-kunning** | Mál: 10% fleiri hits lønarupplýsingar. | *Web-reports atgongd til ILM*<br>*Pedagogiska loysn at presentera lønardátur fyri stovninum*<br>*Stýra at síggja løn niður á stað*<br>*Refferansubólk ísv at menna lønarloysnir web-part 'mínar lønardátur' til intranet* | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Breiða út | Vitan | **Skeið o.t.** | Mál: Minst 600 fólk til tiltøkini hjá Gjaldstovuni | *Skeið (150)*<br>*Stovnsdagur (300)*<br>*Aðalfundur hjá Landsneti (100)*<br>*Skraddaraseymað skeið (50)* | | |
| 7 | Veita | Loysnir til búskaparumsing | **Búskapar-skipan landsins** | Mál: Búskaparskipan landsins liðugt verksett í 2014 | *Dagføra BSL*<br>*Apotekið útgjald og løn*<br>*Almannaverkið útgjald* | | |
| 8 | Veita | KT-undirstøðukervi til almennu Føroyar | **Landsnet** | Mál: 23-hundrað brúkarar í LN í 2014. | *Avklára um heilsu- og skúlaverk skulu í Landsnet*<br>*Benchmarking*<br>*Nøgdsemiskanning*<br>*Útrulla Lync*<br>*Innlima: Eftirlitst., Vørn, Løgtingið, Vinnuháskúlin, Rúsan*<br>*Leingja rakstrarsáttmála við veitarar*<br>*Standard Intranet (SP) bjóða stovnum*<br>*Bjóða út Samnet*<br>*Gera liðugt at konsolidera domenir* | | |
| 9 | Tryggja | Loysnir | **KT-trygd og eftirlit** | Mál: Skipanir (dátur), sum Gjaldstovan varðir av, eru á nøktandi trygdarstigi | *Grannskoða øll økir*<br>*Loysa høgt raðfestar veikleikar undan næstu grannskoðan*<br>*Seta í verk FAK-SLA*<br>*Seta í verk felags tilbúgving fyri BSL, LN og GJ*<br>*Góðskutryggja kommunuroknskapir*<br>*Standard loysn trygdarpolitikk til "einfaldar" stovnar* | | |
| 10 | Fyrisiting | Kvíggjartún 1 (FMR) | **Felags fyrisiting** | | *Skipað at viðlíkahalda bygning* | | |
| *11* | *Veita* | *"Felags" KT-tænastur* | | | | | |
| *12* | *Leiða* | *Digitalisera almennu Føroyar* | | | | | |

| | Útgjaldsskipanin | Bókhaldsskipan | Lønarskipan |
|---|---|---|---|
| Taks | Við í ár 2013 | - | - |
| Apotekið | Við í ár 2014 | - | Við í ár 2012 |
| Rúsan | Við í ár 2014 | - | - |
| *Ellisheim (við egnum bókhaldi)*)* | | | |
| Strandferðslan | Við í ár 2013 | Við í ár 2013 | Við í ár 2013 |
| Ymsir smærri forsorgarstovnar | Við í ár 2013 | Við í ár 2013 | Við í ár 2013 |
| | | | |

*) Hesir stovnar verða kommunalir, tí verður hetta lagt á ís.

## Sáttmálaskeiðið og uppfylging

Sáttmálin kemur í gildi 1. februar í 2014 og er galdandi til 31. januar í 2015.

Hesir dagar eru settir at fylgja upp:

| | |
|---|---|
| Juni 2015 | |
| | |
| | |

Tá ið mett verður um, um Gjaldstovan røkkur settum málum og avrikskrøvum, verður dentur lagdur á, at tey eru rokkin innan fyri fíggjarligu karmarnar og til ásettu tíðina.

Verða fortreytirnar munandi broyttar, eftir tað at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, eru partarnir samdir um tað.

Ráðið ynskir til næstu ferðina, at onkur produktiónsmál vera fyri roknskaparhaldið.

Argir, tann 18. februar 2014

Fyri Fíggjarmálaráðið

Bjarni Askham Bjarnason

Fyri Gjaldstovuna

Leif Abrahamamsen

# Fylgiskjal uppfylging 2013

GJALDSTOVAN | TORSHAVN, 27 FEBRUARY 2014

# ÆTLAN 2013 UPPFYLGING ENDALIGT

GJALDSTOVAN

# MÁL: TRYGD OG EFTIRLIT YVIRMIÐAL. ÚRSLIT MIÐAL

| Avrik | |
|---|---|
| Heildarskoðan av LN = yvirmiðal | ☺ |
| Heildarskoðan av BSL = yvirmiðal | ☺ |
| Staðfesting oraclelicensir eru ok | ☺ |
| Loggingsverkætlan LN verksetast | ☹ |
| Stýr á brúkarum IDM (fasa 1) | ☺ |
| Betri yvirvaking servarar Landsnet | ☹ |
| Loysn til avstem skatting pensión | ☺ |
| Fígging landsins við í eftirlit | ☺ |
| Seta í verk Fak-sla fyri LN | ☹ |




GJALDSTOVAN

# MÁL : 5% FLEIRI HITS Í LK 2013
# ÚRSLIT 0%

| Avrik | |
|---|---|
| 10-20 nýggjheitir á heimasíðu – ein yvirskrift á leiðslufundarskránni | ☹ |
| Gera yvirlit til uppgerð av gjaldførinum | ☺ |
| LKS-funkur til lønarsamráðing (talvur) | ☹ |
| Skipað undirvísing Lønardeild | ☹ |
| Web-report takast við í undirvísing | ☺ |
| Upplýsingar úr Skúlaforskipan í LKS | ☹ |
| Hvat ynskja komm (samarb forum) | ☺ |
| Meir leiðslukunning innvunnin frítíð, | ☹ |
| búskettár (2) og 3. geiri | ☺ |




GJALDSTOVAN

# MÁL 4: 5% AV ARBEIÐSTÍÐ TIL ÚTBÚGVING. ÚRSLIT 4%

| Avrik | |
|---|---|
| Førleikasamrøður haldast í mai | ☺ |
| Førleikamenningarkatalog í mun til avrik. | ☺ |
| Ein dag skeið í játtanarverkinum | ☺ |
| Skrá fyri fríggjadagsfundir | ☺ |
| Organisatiónsmenning og samskifti | ☹ |



# MÁL : 600 FÓLK TIL TILTØK HJÁ GJALD-STOVUNI. ÙRSLIT OMANFYRI 600.

| Avrik | Fólk | |
|---|---|---|
| Skeið vár + heyst | 100 | ☺ |
| Gjaldst fyriskipar stovnsdag | 200 | ☹ |
| Aðalfundur Landsnet | 80 | ☺ |
| Vitja 10 stovnar | 40 | ☺ |
| Skraddaraseymað skeið | 40 | ☺ |
| Kommunutiltøk | 50 | ☺ |



GJALDSTOVAN

# MÁL : 23-HUNDRAÐ TELDUR Í LN Í 2015. ÚRSLIT 2013 : 200 TELDUR

| Avrik | |
|---|---|
| Semjast um eina «fusion» millum LN og Landssjúkrahús | ☹ |
| Verkseting SLA-fakskipanir | ☹ |
| Fastleggja ein leist fyri innlimingarmannagongd | ☺ |
| Implementera Lync | ☺ |
| Innlima SSL, Akstovan, Sjóndepilin, Jarðfeingið | ☺ |
| Justera prísmyndil | ☺ |




GJALDSTOVAN

Mál at avgreiða 40

# MÁL 7: BÚSKAPARSKIPAN LANDSINS LIÐUGT VERKSET Í 2014

| | Figs | Út-gjald | Rokn-skap | Løn | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Taks** | 2013 | 2013 | - | - | ☺ |
| **Apotekið** | | 2014 | - | 2013 | ☹ |
| **Rúsan** | | 2014 | - | - | |
| **Ellisheim** | | 2014 | 2013 | 2013 | ☹ |
| **Ssl** | | 2013 | 2013 | 2013 | ☺ |
| **Forsorgstovn** | | 2013 | 2013 | 2013 | ☺ |
| **Almannaverk** | | 2013 | | | ☹ |
| **KVF-web-serv** | | | 2013 | | ☺ |






# VERKSETING AV FÍGGING LANDSINS Á GJALDSTOVUNI

| Avrik | |
|---|---|
| Skipan til uppgerð av gjaldføri (víðkað gjaldførisyvirlit) | ☺ |
| Rapportering til Moodys mennast í okkara skipanum | ☺ |
| Skipa grannskoðan og eftirlit | ☺ |
| Gera/dagføra roknskaparinstruks | ☺ |
| Seta mál fyri deildina | ☺ |
| Fáa Fígging landsins á heimasíðuna | ☺ |
| Avtala um AMEG | ☺ |



# VERKÆTLANIR SAMAN VIÐ FMR

| Avrik | |
|---|---|
| Fáa umsiting av Landsbankafunktiónum í eina trygga legu við væl allýstum successkriterium | ☺ |
| Definera alment innkeyp og skipan av hesum á Gjaldstovuni + successkriterii | ☺ |
| Síggja dátur úr Skattaskipanini og øðrum skipanum í LKS | ☹ út |
| Fáa mánaðarlig roknskapardátur frá 3. Geira inn í skipanirnar hjá Gjaldstovuni | ☺ |
| | |



GJALDSTOVAN

# NAKRAR VERKÆTLANIR Á GJALDSTOVUNI 2013 #1

| Avrik | |
|---|---|
| Projektorientering | Íg |
| Dagføring  av BSL til release 12 | Íg |
| Innføra nýtt "ein innritan"  Oracle og MS | Íg |
| Nýggj skipan at umsita atgongdir (IDM) | ☺ |
| Forrita nýggja rokningarverkgongd | ☺ |
| Skipa skjøl | Íg |
| | |



GJALDSTOVAN

# NAKRAR VERKÆTLANIR Á GJALDSTOVUNI 2013 #2

| Avrik | |
|---|---|
| Skúlaforskipan fasa 2 | ☺ |
| Yvirtøka av Vaktætlan | ☹ Út |
| Sharepoint SLA við ELK | ☺ |
| Innrætting av ovastu hædd | ☹ |
| | |



WWW.
GJALDSTOVAN.
FO

KVÍGGJARTÚN 1, ARGIR
POSTBOKS 2009
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

TEL (+298) 352 400
FAX (+298) 352 401
GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO

GJALDSTOVAN